LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

**Fylgiskjal** **24. november 2025**

# Skúlin á Trøðni

Skúlin á Trøðni heldur til á Frælsinum 32 í Tórshavn.

Talan er um ein serskúla fyri børn við serligum tørvi og sum skal undirvísa næmingum, ið ikki kunnu fáa nøktandi undirvísing í nærumhvørvinum. Skúlaárið 2024/25 gingu umleið 70 næmingar í aldrinum 7-18 ár á skúlanum. Í serligum føri kunnu næmingar ganga í skúlanum, til teir eru 21 ára gamlir. Flokkarnir eru 20 í tali, vanliga við einari samanseting millum tríggjar og fimm næmingum í hvørjum flokki.

Skúlabygningurin stóð liðugur í 1976 og var tá ein sjálvsognarstovnur. Í 1990 varð skúlin ein almennur skúli innan føroyska fólkaskúlan, og visitatiónsnevndin varð tikin av. Í 1998 varð Skúlin á Trøðni avtikin sum egin skúli og lagdur undir Sernámsfrøðiligu Ráðgevingina, ið fekk navnið Sernámsdepilin. Í mai 2005 varð nýggj løgtingslóg um serskúla sett í gildi, og Skúlin á Trøðni gjørdist aftur sjálvstøðugur skúli við stjóra, stýri og upptøkunevnd.

Í skúlanum starvast 47 starvsfólk, íroknað skúlastjóran. Talan er í høvuðsheitum um lærarar, námsfrøðingar og hjálparfólk.

# Viðmerkingar og tilmæli umboðsmansins

Samanumtikið er talan um ein skúla fyri børn við serligum tørvi, sum undirvísir næmingum, ið ikki kunnu fáa nøktandi undirvísing í nærumhvørvinum. Dentur tóktist at verða lagdur á at skapa eitt frálæruumhvørvi, ið er stimbrandi og mennandi fyri næmingarnar. Harafturat tóktist fokus verða á at geva næmingunum upplivingar í felagstiltøkum og útferðum.

Avvarðandi lótu í høvuðsheitum væl at skúlanum og starvsfólkunum, men høvdu eisini atfinningar um ávís evnir og ynskir um batar.

Grundað á samrøðuna við leiðsluna, samskifti við tey avvarðandi, skjøl, ið umboðsmaðurin hevði fingið útvegað, og samskifti við avvarðandi myndugleikar, hevði umboðsmaðurin valt at gera viðmerkingar og tilmæli til ymisk viðurskifti kring skúlan.

Umboðsmaðurin vil serliga leggja dent á ringu ljóðviðurskiftini og misjøvnu næmingalagaðu læruætlanirnar, sum eru viðurskifti, ið áttu at verða fingin í rættlag beinanvegin.

Umboðsmaðurin vil gera vart við, at brotið **Flutningur** viðger eisini eina almenna avbjóðing við flutningi av næmingum og børnum, ið bera brek, tá hesi nýta tænastur og serskúlatilboð, eitt nú Skúlan á Trøðni. Evnið er eisini viðgjørt í eftirlitsfrágreiðingini frá dag- og

umlættingarstovninum Mýrisóljan (LUM 23/18132), og er viðgerðin í hesari frágreiðing framhald av hesum.

**Upptøka av næmingum**
Sambært § 10, stk. 1 skal upptøkunevndin gera tilmæli til landsstýrismannin um langtíðar upptøkuætlan skúlans. Harafturat er ásett í § 10, stk. 3, at landsstýrismaðurin ger reglur fyri virksemið hjá upptøkunevndini.

Í serligu viðmerkingunum til § 10 stendur m.a.:

> "...
> Upptøkunevndin er eitt amboð hjá landsstýrismanninum og skal á fundunum røða um og taka støðu til almennar reglur um upptøku og gera tilmæli til landsstýrismannin um hesi viðurskifti.
> ..."

Umboðsmaðurin mæti Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til at gera reglur fyri virksemið hjá upptøkunevndini, soleiðis sum ásett er í § 10, stk. 3. Harafturat mælti umboðsmaðurin Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til at taka støðu til, um upptøkunevndin framyvir skuldi gera tilmæli til landsstýrismannin um langtíðar upptøkuætlan skúlans, ella um broytingar skuldu gerast hesum viðvíkjandi. At ásetingin, ið er greið, ikki varð útint í verki, metti umboðsmaðurin ikki vera haldgóða lógarfyrisiting.

**Samskifti**
Í sambandi við eftirlitsvitjanina hevði umboðsmaðurin víst á, at avvarðandi at næmingum í skúlanum høvdu víst á, at kunning og samskifti frá skúlanum ikki var nøktandi. Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at skúlin ikki hevði nakran samskiftispall, men at lærararnir nýttu teldupostsamskifti og samskiftu umvegis sosialar miðlar.

Umboðsmaðurin mælti til, at leiðslan fór at endurskoða sín samskiftispolitikk og gera eina mannagongd kring samskifti, soleiðis at samskifti ikki einans var tengt at samskiftisháttinum hjá teimum einstøku lærarunum, ið kundi vera ymiskur, bæði í mun til hvussu ofta samskift varð, hvat, ið samskift varð um, og á hvørjum samskiftispalli samskift varð.

Umboðsmaðurin heitti eisini á leiðsluna um at kanna møguleikan at fáa ein felags samskiftispall. Umboðsmaðurin vísti á, at slíkur samskiftispallur eitt nú var royndur innan dagstovnaøkið.

**Rørsla**
Umboðsmaðurin spurdi, hvussu rørsla var ein partur av skúladegnum hjá næmingunum. Umboðsmaðurin spurdi í hesum sambandi, hvussu skúlin tryggjaði sær, at teir næmingar, ið vegna teirra kropsliga ella fatanarliga førleika ikki sjálvir vóru førir fyri at fara út, høvdu møguleika at fara út.

Leiðslan greiddi frá, at svimjing og ítróttur eru partur av undirvísingini í skúlanum. Leiðslan greiddi eisini frá, at skúlagarðurin og felagsøkið inni vóru tøk til kropsliga íðkan og spæl. Leiðslan greiddi harafturat frá, at tað var upp til einstaka læraran, ið varðaði av næmingunum, hvussu teir næmingar, ið ikki megnaðu tað sjálvir, sluppu út í skúlagarðin. Dentur varð lagdur á, at ongin varð tvingaður út í skúlagarðin.

Umframt hetta, greiddi leiðslan frá, at tørvur var á fleiri og betri loftslyftum í skúlanum. Tey høvdu ongar loftslyftur í skúlastovunum ella í felagsøkinum, men at har vóru lyftur á vesinum. Svimjuhylurin hevði lyftu, ið tó tørvaði eina dagføring. Ein flytfør lyfta var tøk, men hendan kundi ikki samanberast við ágóðan av einari loftslyftu.

Umboðsmaðurin vísti á, at sambært grein 24 í Breksáttmálanum skulu útbúgvingarstovnar tryggja sær, at næmingar, ið bera brek, fáa eina inkluderandi, haldgóða og lívslanga frálæru, ið er lagað eftir tørvinum hjá næminginum. Sum ein partur av einum inkluderandi frálæruumhvørvi, hevur tað týdning, at næmingar, ið bera brek, kunnu troyta møguleikar uttandura í frískari luft og við tillagaðum uttanduraítrivum á jøvnum føti við aðrar næmingar, ið ikki bera brek.

Umboðsmaðurin mælti Skúlanum á Trøðni til at kanna, hvussu skúlin tryggjaði sær, at næmingar, ið vegna teirra kropsliga ella fatanarliga førleika, ikki sjálvir vóru førir fyri at fara út, altíð høvdu møguleika at fara út eftir tørvi og luttaka í uttanduraítrivum við inklusjón fyri eyga.

Umboðsmaðurin fór eisini at mæla Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til at kanna eftir, um tørvur var á fleiri og betri loftslyftum í skúlanum, soleiðis sum leiðslan hevði víst á, so at vantandi lyftur ikki vóru ein forðing fyri luttøku næminganna í skúlans virksemi.

**Felagstiltøk og útferðir**

Leiðslan greiddi frá, at tey raðfesta høgt at hava felagstiltøk og útferðir, ið styrkja um sosialu sambondini millum næmingarnar og næmingarnar og skúlan.

Umboðsmaðurin spurdi, um skúlin skipaði fyri flutningi í sambandi við felagstiltøk uttan fyri skúlan og útferðir annars.

Avvarðandi høvdu fýlst á, at skúlabussurin ikki rúmaði einum koyristóli, uttan so, at bussurin varð tillagaður til tað í hvørjum einstøkum føri

Leiðslan svaraði, at skúlin hevði ein buss, ið hevði møguleika fyri at taka næmingar, ið nýttu koyristól, eitt nú við fjølbreki. Um so var, skuldi ein lyfta setast á bussin og nakrar broytingar gerast innan í bussinum. Leiðslan greiddi frá, at neyðugt var hjá avvarðandi at boða frá luttøku í góðari tíð, soleiðis at bussurin kundi gerast út til tørvin.

Umboðsmaðurin fór at heita á Skúlan á Trøðni um altíð at syrgja fyri, at næmingar, ið vóru tengdir at koyristóli, fingu luttikið í felagstiltøkum og útferðum á jøvnum føti við aðrar næmingar. Hetta til tess at tryggja atkomu og inklusjón í sambandi við frálæruumhvørvið, samsvarandi grein 24 í Breksáttmálanum. Her verður eitt nú hugsað um møguleikan at ferðast saman við øðrum í skúlabussi.

**Fráfaringarskjal**
Í sambandi við eftirlitsvitjanina greiddi leiðslan frá, at tá næmingar vóru lidnir við skúlagongdina í skúlanum, fingu teir eina váttan, ið segði, at teir høvdu gingið í skúlanum eitt ávíst skúlaár.

Umboðsmaðurin fekk aftaná eftirlitsvitjanina eitt avrit av einari váttan.

Umboðsmaðurin vísti á, at sambært grein 24 í Breksáttmálanum og grein 23 í Barnarættindasáttmálanum hevur eitt barn, ið ber brek, rætt til eins møguleikar og javnviðgerð í sambandi við sína skúlagongd, ið merkir undirskilt, at barnið eisini fær eina skjalfesting av sínari skúlagongd, ið vanliga verður givið í einum fráfaringarskjali.

Umboðsmaðurin vísti eisini á, at ongin áseting var í serskúlalógini, ið skipaði viðurskifti kring fráfaringarskjal, eins og fólkaskúlalógin ger.

Umboðsmaðurin metti, at váttanin, ið næmingar fingu frá Skúlanum á Trøðni, ikki kundi metast sum ein skjalfesting av skúlagongdini hjá næminginum og ikki samsvaraði við umrøddu greinar í Breksáttmálanum og Barnarættindasáttmálanum.

Umboðsmaðurin heitti á Barna- og útbúgvingarmálaráðið um at skipa fyri, at næmingar á Skúlanum á Trøðni fara at fáa eitt fráfaringarskjal, ið skjalfestir skúlagongdina, eitt nú vunnar førleikar og luttøku í frálæru, samsvarandi teimum meginreglum, ið ásettar eru í viðkomandi greinum í omanfyrinevndu sáttmálum.

Umboðsmaðurin heitti eisini á ráðið um at fáa skipa fyri, at viðurskifti kring fráfaringarskjal verða ásett í lóggávu.

**Undirvísing og læriætlan**
Sambært § 5 í serskúlalógini skal undirvísingin á Skúlanum á Trøðni taka støði í einari næmingalagaðari læriætlan.

Sambært viðmerkingunum til § 5 er ein læriætlan eitt formligt skjal, sum skal skipast soleiðis, at foreldrini fáa eina meting av støðu barnsins, hvussu gongdin hevur verið farna hálva árið, undirvísingartiltøk fyri framman og mál fyri undirvísingina komandi hálva árið. Læriætlanin skal vera eitt amboð hjá foreldrum og lærarum.

Umboðsmaðurin fekk eftir egnum ynski útflýggjað søguligar læruætlanir fyri fimm útvaldar næmingar, trý tey seinastu árini, soleiðis at læriætlanirnar fyri hesar næmingar kundu samanberast yvir tíð.

Til tess at fáa eina fakliga meting av hesum læriætlanum, fekk umboðsmaðurin ein serfrøðing í sernámsfrøði at gera eina samanberandi greining av teimum.

Niðurstøðan av greiningini var tann, at læriætlanirnar vóru misjavnar. Summar vóru miðvísar, greitt orðaðar og stuðlaðu ítøkiligari menning, meðan aðrar tóktust óbroyttar, óítøkiligar og vístu ikki menning frá ári til ár.

Vísandi til hesa greining og viðmerkingarnar til § 5 heitti umboðsmaðurin á Skúlan á Trøðni um skjótast gjørligt at skipa fyri einari fakligari eftirmeting av næmingalagaðu læriætlanunum. Umboðsmaðurin metti, at tað hevði stóran týdning, at læriætlanirnar vóru greiðar og ítøkiligar og viðgjørdu førleikar og menning hjá næmingunum.

**Undirvísingartímar**

Sambært § 6 í serskúlalógini skulu næmingar á Skúlanum á Trøðni sum meginreglu hava sama tal av undirvísingartímum, sum næmingar í fólkaskúlanum.

Á Skúlanum á Trøðni, ið verður mettur sum ein ikki-ársbýttur skúli sambært § 19, stk. 7 í fólkaskúlalógini, er vanligt, at næmingarnir ikki ganga fram í flokkstrinum á hvørjum ári, soleiðis sum gjørt verður í fólkaskúlanum. Leiðslan upplýsti fyri umboðsmanninum, at tað var vanlig og føst mannagongd í skúlanum, at næmingarnir fyrstu tvey árini høvdu 20 undirvísingartímar, og frá triðja ári høvdu næmingarnir upp til 28 tímar um vikuna.

Umboðsmaðurin vísti á, at serflokkar í fólkaskúlanum, t.d. Guli Skúli, ið er skipaður sum serligt undirvísingartilboð í Skúlanum á Fløtum, hava ein skúladag, ið vanliga er frá kl. 08.00 til kl. 13.00. Henda serstaka longd á skúladegnum, er skipað í kunngerð við heimild í fólkaskúlalógini.

Sambært hesum var greitt, at Skúlin á Trøðni sambært serskúlalógini skal hava sama undirvísingartal sum fólkaskúlin, meðan serflokkar í fólkaskúlanum hava serstaka longd á skúladegnum.

Vísandi til upplýsingar frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum var eisini greitt, at Skúlin á Trøðni, hóast hann verður mettur sum ikki-ársbýttur skúli, ikki heilt kundi rúmast í § 19, stk. 7, ið fyrst og fremst vendi sær til fólkaskúlan. Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevði víst á, at tá Skúlin á Trøðni hevði 20 flokkar, var torført at rokna út, hvat minsta markið fyri undirvísingartímum átti at vera, tí útrokningin í § 19, stk. 7 var grundað á, at í mesta lagi seks flokkar vóru í skúlanum. Orsøkin til hetta var, sambært ráðnum, at um ein skúli fór uppum seks flokkar, so átti at bera til at ársbýta skúlan. Tó bar, sambært ráðnum, ikki til at ársbýta Skúlan á Trøðni, tí næmingarnir

fluttu seg ikki fram í flokstrinum eins og í fólkaskúlanum og vóru samansettir eftir einstøkum tørvi og sosialum atlitum.

Umboðsmaðurin mælti Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til at kanna, um tørvur var á at fáa serstaka áseting í serskúlalógini um undirvísingartímar, soleiðis at tað m.a. var púra greitt, hvat minsta markið fyri undirvísingartímum var fyri Skúlan á Trøðni. Í hesum sambandi var tað fyri umboðsmannin avgerandi, at áseting av undirvísingartímum altíð var grundað á eina greiða lógarheimild, og at ítøkilig áseting av undirvísingartímum fyri ein serskúla í øllum førum var grundað á atlit, ið snúgva seg um tørvin hjá einstøku næmingunum við hugtakinum barnsins besta fyri eyga.

**Námsfrøðiligt ráð og foreldraráð**
Bæði serskúlalógin og fólkaskúlalógin hava ásetingar um námsfrøðiligt ráð. Hesar eru at finna í ávikavist § 8, stk. 1 og 3 í serskúlalógini og § 56, stk. 1 og 3 í fólkaskúlalógini, ið innihaldsliga nærum eru meinlíkar.

Í báðum lógum er ásett, at landsstýrismaðurin ger reglur fyri námsfrøðiliga ráðið. Galdandi fyri fólkaskúlan er eitt rundskriv gjørt, ið skipar reglur um m.a. endamál, limir og fundarskipan. Ongar reglur ella rundskriv eru gjørd við heimild í serskúlalógini.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið upplýsti eftirfylgjandi fyri umboðsmanninum, at ráðið og Undirvísingarstýrið høvdu sum siðvenju at nýta somu mannagongdir og meginreglur viðvíkjandi námsfrøðiliga ráðnum fyri fólkaskúlan og Skúlan á Trøðni, hóast rundskrivið einans vendi sær til fólkaskúlan.

Umboðsmaðurin tók hetta til eftirtektar, men fór tó at mæla til, at tær reglur, ið verða fyriskipaðar um námsfrøðiligt ráð í serskúlalógini, vísa til og hava heimild í serskúlalógini.

Sambært § 8, stk. 2 skal eitt foreldraráð verða stovnað, og eisini er ásett, at landsstýrismaðurin ger reglur, um m.a. val og fundarskipan hjá foreldraráðnum.

Sambært Barna- og útbúgvingarmálaráðnum vóru ongar reglur gjørdar fyri skipan av foreldraráði og undir eftirlitsvitjanini kom fram, at Skúlin á Trøðni einki foreldraráð hevði.

Umboðsmaðurin mælti Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til at fáa gjørt reglur fyri foreldraráðið á Skúlanum á Trøðni og saman við skúlanum virka fyri, at skúlin fekk eitt virkið foreldraráð.

**Næmingaráð**
Grein 12 í Barnarættindasáttmálanum ásetur, at eitt barn, sum er ført fyri at orða síni egnu sjónarmið, skal tryggjast rættin til frítt at greiða frá hesum sjónarmiðum í øllum viðurskiftum, sum hava samband við barnið. Dentur skal leggjast á barnsins sjónarmið í samsvari við aldurin á barninum, og hvussu búgvið tað er. Hesin rættur er ikki bara galdandi fyri tað einstaka barnið,

men eisini fyri børn sum bólkur. Barnarættindasáttmálin setur einki niðara aldursmark fyri hesum rætti. Eitt nú skúlar hava tí skyldu at hoyra sjónarmiðini hjá næmingum, bæði í sambandi við avgerðir mótvegis einstaka næminginum og í sambandi við avgerðir, sum ávirka bólkar av næmingum.

Eitt av amboðunum til tess at lúka hesa hoyringsskyldu er, at skúlar hava eitt næmingaráð. Fyri fólkaskúlan er ásett í § 56, stk. 2 í fólkaskúlalógini, at næmingarnir stovna eitt næmingaráð til hvønn skúla, ið hevur 5. ella eldri floksstig. Nærri reglur um næmingaráð eru skipaðar í kunngerð nr. 119 frá 2. juli 2025 um næmingaráð og landsráð fyri næmingaráð fólkaskúlans.

Aftaná eftirlitsvitjanina boðaði Skúlin á Trøðni umboðsmanninum frá, at stovnan av einum næmingaráði var í umbúnað.

Umboðsmaðurin mælti Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til at skipa fyri, at heimild varð í serskúlalógini at stovna næmingaráð og reglur um hetta.

**Skúlastýrið**
Bæði serskúlalógin og fólkaskúlalógin hava ásetingar um skúlastýri. Í fólkaskúlalógini eru ásetingar um skúlastýrið at finna í §§ 50-53, og í serskúlalógini er áseting um skúlastýrið í § 9. Fólkaskúlalógin hevur gjølligar ásetingar um skúlastýri, umframt reglur ásettar um at velja foreldraumboð í skúlastýri og kommunustýrisumboð í felagsskúlastýri.

Serskúlalógin hevur ikki eins gjølliga áseting um skúlastýri, og hóast heimild er at gera nærri reglur um skúlastýrið í serskúlalógini, so hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið boða frá, at hesar ikki eru gjørdar.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið upplýsti eftirfylgjandi fyri umboðsmanninum, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Undirvísingarstýrið høvdu sum siðvenju at nýta somu mannagongdir og meginreglur viðvíkjandi skúlastýri fyri fólkaskúlan og Skúlan á Trøðni.

Umboðsmaðurin tók hetta til eftirtektar, men fór tó at mæla til, at tær reglur, ið verða fyriskipaðar um skúlastýri í serskúlalógini, vísa til og hava heimild í serskúlalógini.

Vísandi til, at leiðslan undir eftirlitsvitjanini hevði upplýst fyri umboðsmanninum, at tað var torført at manna skúlastýrið, og at ivi var um, at skúlastýrið í praksis virkaði sambært lógini og tí siðvenju viðvíkjandi skúlastýri, heitti umboðsmaðurin á Barna- og útbúgvingarmálaráðið um at endurskoða reglurnar um skúlastýrið fyri Skúlan á Trøðni, og hvussu skúlastýrið framyvir skuldi virka í praksis.

**Flutningur**
Bæði leiðslan og avvarðandi høvdu víst á, at flutningur kundi vera ein avbjóðing fyri summi, serliga um talan var um flutning frá Skúlanum á Trøðni til frítíðartilboð, ið vóru uttanfyri Tórshavnar kommunu, umframt støður við brádliga íkomnum flutningstørvi.

Umboðsmaðurin hevur fyrr í aðrari frágreiðing frá einari eftirlitsvitjan (LUM 23/18132) viðgjørt eina almenna avbjóðing við flutningi av næmingum og børnum, ið bera brek, tá hesi nýta tænastur hjá m.a. Almannaverkinum.

Umboðsmaðurin vísti á, at lóggávan á økinum er ymisk, alt eftir innan hvønn geira flutningstænastan verður veitt.

Fyri flutning av næmingum millum heim og skúla er tað ásett í fólkaskúlalógini, at avvarðandi kommuna hevur skyldu at skipa flutningstænastu millum heim og skúla. Skyldan fevnir eisini um næmingar, ið bera brek. Hóast tað er ein skylda, so er tað ikki ásett, hvussu flutningurin av børnum, ið bera brek, verður fyriskipaður, ella hvørji krøv verða sett til tænastuna.

Fyri flutning av næmingum frá Skúlanum á Trøðni til frítíðartilboð hjá kommununum og Almannaverkinum er møguleiki at fáa flutningstænastu gjøgnum Serflutningsskipan Landsins.

Serflutningsskipan Landsins er ein kommunal tænasta, ið er skipað sambært reglugerð, og verður fíggjað ávikavist av landskassanum, avvarðandi kommunu og av brúkarunum. Endamálið við skipanini er at veita flutningsmøguleika til fólk, ið bera brek og eru so mikið tarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól, ella í avmarkaða tíð vegna sjúku ella skaða hava henda tørv. Almanna- og mentamálaráðið hevur upplýst fyri umboðsmanninum, at Serflutningskipan Landsins einans virkar í Tórshavnar kommunu og í Klaksvíkar kommunu og ikki virkar tvørtur um kommunumark.

Fyri flutning av næmingum frá Skúlanum á Trøðni til frítíðartilboð og aðrar tænastur hjá Almannaverkinum er heimild fyri flutningstænastu í § 43 í Almannalógini.

Almanna- og mentamálaráðið hevði tó greitt umboðsmanninum frá, at flutningstænasta sambært § 43 í Almannalógini ikki var sett í verk orsakað av, at játtan ikki var sett av til endamálið.

Umboðsmaðurin vísti eisini á, at bæði Breksáttmálin og Barnarættindasáttmálin viðgera evnið flutning av børnum, ið bera brek, og vísa á, at vantandi flutningsmøguleikar hjá børnum, ið bera brek, kann elva til, at hesi børn verða útihýst frá útbúgvingarskipanum og øðrum viðkomandi tænastum og tískil eru fyri mismuni í mun til teirra javnlíkar. Báðir sáttmálar tala fyri, at slíkar forðingar eiga at verða beindar av vegnum við inklusjón fyri eyga.

Umboðsmaðurin mælti Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til, at ráðið tók stig til at fáa sett í verk greiðar reglur og mannagongdir um flutningstænastu fyri børn, ið bera brek.

Umboðsmaðurin metti, at talan átti at vera um eina landsfevnandi flutningstænastu, ið tók støði í bestu loysn fyri Føroya børn, og at henda loysn slóðaði fyri, at tað ongantíð var ivi um ella tilvildarligt, hvørja flutningstænastu børnini fingu, og á hvørjum støði hon varð veitt, í mun til hvar í landinum tey búðu.

Umboðsmaðurin mælti Almanna- og mentamálaráðnum til at skipa fyri, at Serflutningsskipan landsins varð endurskoðað, við tí í huga, at skipanin ikki var landsfevnandi og ikki virkaði tvørtur um kommunumørk.

Umboðsmaðurin mælti eisini Almanna- og mentamálaráðnum til skjótast gjørligt at taka støðu til, um heimildin fyri flutningstænastu skuldi setast í verk sambært § 43, soleiðis, sum ásetingin var orðað nú, ella um okkurt annað skal setast í staðin. At § 43 í fleiri ár hevði veitt rættindi, ið í roynd og veru ikki góvu nakran rætt, var sambært umboðsmanninum ikki ein haldgóð støða og ei heldur nøktandi fyri tey børn, ið hava tørv á flutningstænastu.

**Harðskapur og tvingsil**
Sum meginregla er ikki loyvt at nýta tvingsilsinntriv uttan greiða lógarheimild.
Hendan meginreglan er staðfest í § 71 í Grundlógini (Lov nr. 169 af 5. juni 1953 om Danmarks Riges Grundlov) og grein 5 í Evropeiska mannarættindasáttmálanum. Harafturat finnast greinar í Breksáttmálanum og Barnarættindasáttmálanum, ið siga tað sama, m.a. grein 14 í Breksáttmálanum og grein 37 í Barnarættindasáttmálanum.

Uttan mun til hetta, so er galdandi, at eitt nú skúlar hava heimild at seta ávís tiltøk í verk, ið hava sum endamál at skapa ordan og skipa ein ávísan atburð. Hetta verður eitt nú gjørt í sonevndum skilhaldsreglum. Tó kunnu slíkar reglur ongantíð fara so vítt, at talan í veruleikanum er um tvingsilsinntriv, sum t.d. læsing av hurðum til tess at forða fyri rásarúmi.

Starvsfólk, á eitt nú skúlum, hava, til tess at fáa tamarhald á ávísum vandastøðum, heimild at nýta tvingsilsinntriv uttan lógarheimild. Talan er um sonevndan neyðrætt, ið kann nýtast í heilt serligum førum, har støðan er bráðfeingis, og talan er um eina neyðloysn, ið má halda uppat so skjótt sum støðan loyvir tí.

Leiðslan hevði undir eftirlitsvitjanini greitt umboðsmanninum frá, at skúlin hevði læstar hurðar millum ávísar lonir í skúlanum. Í praksis merkti hetta, at summir næmingar ikki høvdu fría atgongd til felagsøkið. Talan var um eina skipan, har hurðin var læst, men at ein lærari, sambært leiðsluni, altíð var hjástaddur við einum lykli og kundi lata upp. Hetta varð gjørt fyri, at næmingar, ið høvdu tørv á friði, fingu frið, og fyri at næmingar, ið høvdu hug at reika millum lonir við møguligum útvirknum atburði, ikki fingu høvi til tess.

Læsing av hurðum inni í skúlanum millum lonir, soleiðis at summir næmingar ikki høvdu frítt at fara út í felagsøkið uttan at ein vaksin kom og læsti teimum upp, var eftir umboðsmansins meting

eitt tvingsilsinntriv, ið kravdi greiða lógarheimild, og sum ikki átti at verið útint uttan slíka lógarheimild og tískil átti at hildið uppat.

Umboðsmaðurin mælti Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til, at skipa fyri, at Skúlin á Trøðni fekk eina mannagongd í sambandi við harðskapsstøður, har bráðfeingis tvingsilsinntriv kundu gerast neyðug. Hetta soleiðis at harðskapsstøður kundu handfarast á bestan hátt, og trygd kundi veitast fyri, at tey bráðfeingis inntriv, ið vórðu sett í verk, vóru egnaði og lutfalslig.

Umboðsmaðurin mælti eisini Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til at kanna, um Skúlin á Trøðni hevði tørv á serligum fyriskipanum til frama fyri trygd og trivnað hjá næmingum, og samstundis kanna, um neyðugt var at skipa fyri, at lógarheimild varð fyri tvingsilsinntrivum. Vísast kundi í hesum sambandi á Tvingsilslógina (løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin), ið m.a. skipar, hvørji tvingsilsinntriv eru lóglig at nýta móti borgarum, ið nýta tænastur frá m.a. Almannaverkinum.

**Skúlaumhvørvið**

Áðrenn eftirlitsvitjanina høvdu avvarðandi greitt frá um munandi afturljóð í ávísum støðum á Skúlanum á Trøðni, m.a. felagsøkinum, har nógvir næmingar savnast. Undir eftirlitsvitjanini kundi umboðsmaðurin sanna, at talan var um eitt munandi afturljóð, og leiðslan viðurkendi, at talan var um eitt munandi afturljóð, ið sambært leiðsluni eisini hevði sína orsøk í aldrinum av bygninginum.

Umboðsmaðurin heitti á Skúlan á Trøðni um beinanvegin at taka stig til at kanna ljóðviðurskiftini í skúlanum og gera eina ætlan um, hvussu hesi viðurskifti kundu betrast.

Umboðsmaðurin vísti á, at skúlin hýsir eitt nú næmingum, ið eru ljóðviðkvæmir og verða ávirkaðir neiligt av vánaligum ljóðviðurskiftum. Ljóðviðurskifti eiga ikki at verða ein forðing fyri, at næmingar fáa luttikið í felagstiltøkum í einum skúla. At talan er um ein serskúla, ger støðuna bara enn meiri átroðkandi.